www.oljan.fo

Jan Müller 26 - 07 - 2013

Oljustjórar bergtiknir av føroysku náttúruni

Vit eru komnir til Føroya fyri at hitta og læra føroyingar at kenna og síggja hetta landið, sum vit gera íløgur í, sigur Kevin Biddle frá heimsins størsta oljufelag, ExxonMobil. Saman við einum av starvsfeløgum sínum, Tristan Aspray, vitjaði hann í Føroyum fyrr í hesi vikuni. Ørindini vóru fyrst og fremst at tosa við umboð fyri fyristøðufelagið Statoil, sum stendur á odda fyri Brugdan 2 brunninum, ið verður boraður aftur á landgrunninum komandi ár. Men ørindini vóru eisini at heilsa uppá fólkini á Jarðfeingi, sum umsita leitiloyvini. Vilja læra um samfelagið Vit vilja sjálvandi eisini læra so nógv til ber um tey samfeløgini vit velja at arbeiða í, og Føroyar eru eitt teirra. Tað er altíð gott og rætt at kenna til lokalsamfelagið, tá vit gera íløgur í oljuleiting, sigur Kevin, sum samtíðis fegnast um, at ExxonMobil er partur av føroysku oljuleitingini. Sjálvur hevur hann drúgvar royndir í oljuvinnuni, og í dag hevur ein av mest týðandi ábyrgdarsessunum hjá hesum tí størsta oljurisanum í heiminum, ExxonMobil. Hann er ovasti fyri allari leiting í Europa og Kaspiska økinum. Kevin er føddur og uppvaksin í California men arbeiðir í dag í amerikanska oljuhøvuðsstaðnum, Houston í Texas. Við honum er eisini Tristan Aspray, føddur og uppvaksin í Australia men nú búsitandi í London, har hann hevur høvuðsábyrgdina av oljuleiting í Stórabretlandi og Norðuratlantshavi, her íroknað Føroyum. Bergtiknir av náttúruni Tá oljan.fo spyr teir um komandi boringina í Føroyum, vísa teir til Statoil, sum er fyristøðufelag og harvið talsmaður fyri eisini teirra virksemi her. Men teir hava einki ímóti at siga sína hugsan um føroysku náttúruna, sum teir í ríkiligt mát hava upplivað frá tí góðu síðuni hesar fáu dagarnar í Føroyum. Teir siga seg kenna seg sera vælkomnar í Føroyum. Fólk eru vinarlig, blíð og fyrikomandi. Og náttúruupplivingar hava teir fingið, so tað forslær. Fyrst vóru teir undir Vestmannabjørgunum. Síðani gekk leiðin út í Mykineshólm. Í

allarbesta sólskinsveðri. Tit eiga eina undurfulla og bergtakandi náttúru, siga teir báðir eftir ein frálíkan túr undir Vestmannabjørgunum við Barbaru hjá Sjóferðum í Vestmanna. Oljan.fo var við teimum og stjóranum í Statoil, úti undir Vestmannabjørgunum í góðveðrinum týsdagin, og vóru teir fullkomiliga bergtiknir av stórslignu náttúruni. Teirra stóri áhugi er fuglalívið, so hóast meira hevur verið til av fugli í bjørgunum áður, so megnaði skilagóði og sjarmerandi frásøgumaðurin, Bjarki Skúvadal at finna fugl bæði á fjallarókunum og undir bjørgunum. Oljuprát Og sjálvandi kom prátið eisini inn á oljuleitingina við Føroyar, nú tríggir framstandandi oljustjórar vóru við í ferðalagnum á hesum vælsignaða túri. Verður tað nú, at oljan verður funnin, var tað onkur av ferðafólkunum, sum spurdi. Og vinsælu og lítillætnu amerikanararnir peikaðu á Statoil-stjóran, sum við einum lítlum "skálka"-brosi bað fólk vera tolin. Lat okkum nú fáa at síggja. Váðin og óvissan eru stór, men finna vit nakað, so kann tað eisini blíva til nakað stórt. Og bráddliga fara nakrir sjáldsamir gestir framvið, tveir lundar, og henda sjáldsama sjón fær fólk at gloyma alt um olju og gass. Tað er nevniliga óvanliga lítið av lunda at síggja í ár, og tað er seinasta viðmerkingin frá frásøgumanninum Bjarka, sum nú hevur sett seg við stýrisvøl og sett kós móti Vestmanna. Verður oljan funnin í næstum, so er lítið at ivast í, at m.a. góðu fólkini, sum standa fyri Sjóferðum, kunnu vænta sær at síggja fleiri oljufólk á útferðum sínum í framtíðini. Myndir: Teir tríggir oljustjórarnir frá ExxonMobil og Statoil her saman við skipara og frásøgumanninum, Bjarka Skúvadal undir Vestmannabjørgunum. Frá ferðini undir Vestmannabjørgum Myndatøka: Jan Müller/oljan.fo